


*Tjaldur vann við átta málum og hevur kós í finaluna*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

# Tjaldur nærkast finaluni

**HONDBÓLTUR** Tjaldur hevur annað beini í steypafinaluni. Kvinnurnar úr Runavík vunnu við átta málum í høllini á Hálsi í gjár

Uni Holm Johannesen

Tjaldur og Trygvi Mortensen, venjari, buldra víðari.

Kvinnurnar úr Runavík vunnu 31-23 á Neistanum í fyrru hálvfinaluni. Hálvleiksstøðan var 16-14 til gestirnar.

Barbara Brauer, sum hevur gingið undan hjá Neistanum í hesum kappingarárinum, var ikki tøk, tí hon varð útvíst í landskappingardystinum móti VB um vikuskiftið.

Tað merktist serliga væl í álopsspælinum.

Liðini togaðust um leiðsluna í fyrra hálvleiki. Eftir steðgin fóru gestirnir, við Adinu Petra á odda, undan heimaliðnum.

Greiði sigurin gevur Tjaldur eitt gott útgangsstøði undan seinnu hálvfinaluni, sum verður spæld 2. februar í Runavík. Tá verða Barbara Brauer og Nicoleta Radu Hansen væntandi tøkar hjá Neistanum.

Adina Petra, Tjaldur, var toppskjútti við 12 málum. Bára Hansen var toppskjútti hjá Neistanum við sjey málum.

# Neistin vann við 11 málum

**HONDBÓLTUR** Tað er líkt til, at Neistin verður annað liði í mansfinaluni í steypakappingini í ár. Greipuvinnararnir vunnu greitt á VÍF í gjár

Uni Holm Johannesen

Tað er mest sum greitt, at Neistin verður annað av finaluliðunum í steypakappingini í ár.

Greipuvinnararnir vunnu 31-20 á VÍF í fyrru hálvfinaluni í høllini á Hálsi í gjár.

Hálvleiksstøðan var 14-7 til Neistan.

Heimaliðið var við yvirlutan allatíðina, og gestirnir, sum vóru væl við fyrstu minuttirnar, runnu mest sum bara aftaná.



*11 mál vóru á muni í Høllini á Hálsi í gjár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Bartal Hansen, sum loysti av Ára Egason Dam, ið ikki var við vegna sjúku, stóð seg væl sum málverji.

David Edvardsen rann fremst í álopsspælinum. Hann var eisini toppskjútti við níggju málum.

Áki G. Olsen skeyt flest mál fyri vestmenningar. Hann fekk fýra mál.

Seinna hálvfinalan verður spæld í høllini í Vestmanna tann 1. februar.

# Stutt ævintýr hjá Rubeksen-brøðurnum

**FÓTBÓLTUR** Hendrik Rubeksen og Thomas Hans Rubeksen fáa seg ikki royndar í norskum fótbólti á hesum sinni. Teir hava boðað Volda frá, at teir eru sinnaðir at flyta til Noregs, hóast alt

Uni Holm Johannesen

Nevndin í felagnum varð kunnað um ætlanirnar í gjár. Tað sigur Tor Hallaråker, ítróttarstjóri í Volda, við Rás2 í dag.

– Vit vita ikki annað enn, at teir verða ikki partur av leikarahópinum hjá okkum, sigur Hallaråker, sum harmast støðuna. Felagið hevur havt ávísar útreiðslur av føroyingunum, og nevndin fer at krevja pengarnar aftur.

Boðini frá Hendrik Rubeksen og Thomas Hans Rubeksen koma óvart á ábyrgdarmenninar í Volda. Nevndin fer skjótt at meta um avleiðingarnar av avgerðini. Hópurin er framvegis breiður, men liðið manglar ein vong og ein framherja.

– Vit harmast avgerðina, men skilja ikki niðurstøðuna. Tað hjálpir hinvegin lítið at grenja, sigur Tor Hallaråker við Rás2.




*Thomas Hans Rubeksen*

*Savnsmynd*

Føroysku brøðurnir vóru við í venjingardysti fyri Volda stutt fyri jól. Liðið spældi 3-3 móti Larsnes/Gursken. Thomas Hans Rubeksen skeyt fyrsta málið í dystinum.

*uni@sosialurin.fo*

## Neistin – Tjaldur 23-31 (14-16)

Dómarar: Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen

**10 min.: 4-5**
**20 min.: 10-11**
**40 min.: 16-22**
**50 min.: 19-25**

**Neistin:** Bára Hansen 7, Jacklin Durhuus 3, Lovisa Andreasen 3, Katrin á Neystabø 2, Rakul Magnussen 2, Unnur Danielsen 2, Elin Holm 2, Birita Wardum 1, Marjun Danberg 1.
**Tjaldur:** Adina Petra 12, Simona Petersen 8, Annika Thomsen 4, Heidi Sevdal 2, Sarah Ann Thomsen 2, Cornelia Rimbu 2, Jóhanna í Króki 1.
Útvísingar: Neistin 1, Tjaldur 1.

## Neistin – VÍF 31-20 (14-7)

Dómarar: Ragnar Simonsen og Rúni Mohr

**10 min.: 4-3**
**20 min.: 8-5**
**40 min.: 22-11**
**50 min.: 28-15**

**Neistin:** David Edvardsen 9, Áki Mørk 6, Sjúrður Thomassen 5, Heini Hanusarson 5, Jákup Apol 2, Jugoslav Djumic 2, Ingi Olsen 1, Heini Ragnarson 1.
**VÍF:** Áki G. Olsen 4, Rúni Fossdal 4, Joen P. Høgnesen 3, Sámal Joensen 2, Jákup Kristiansen 2, Magnus Muller 2, Jákup A. Joensen 2, Holgar Durhuus 1.
Útvísingar: Neistin 4, VÍF 3.